Eik

# Størv í Eik

## Vit sóknast eftir bókhaldara og toymisleiðarum til Deildartænastuna og eldhugaðum starvsfólkum til Kundatænastuna Yviri við Strond í Havn

Á Deildartænastuni starvast í løtuni 17 starvsfólk við ymsum umsitingaruppgávum, m.ø. fyri privatkundaøkið, avgreiðslu av virðisbrøvum, uttanlandsflytingum og gjaldskortum.

**Bókhaldari**
Innanhýsis bókhaldsuppgávurnar í Eik verða nú skipaðar í eina eind, og tí sóknast vit eftir einum bókhaldara at standa fyri eindini. Uppgávurnar verða m.a. at umsita kreditorbókhald, innanhýsis kontur og aðrar bókhaldsuppgávur.

**Toymisleiðarar**
Høvuðsuppgávan hjá Deildartænastuni er at røkja umsitingarligar uppgávur á privat kundaøkinum og røkja seruppgávur fyri Eik. Deildin er við til at standardisera og effektivisera innanhýsis tilgongdir í Eik, og tryggja, at uppgávurnar verða loystar skynsamt fyri allar partar. M.a. verður arbeitt við at skipa arbeiðsgongdirnar á deildini sambært LEAN arbeiðsháttinum.

Fyri at náa hesum máli sóknast vit eftir tveimum toymisleiðarum til høvuðsøkini á deildini.

- Annar toymisleiðarin fær ábyrgd av umsitingaruppgávum á privatkunda-økinum, m.ø. realkredittoyminum, tinglýsingum, deyðsbúgvum, kunda-arkivinum, tryggingum og pensjónum. Á hesum øki starvast í dag 9 fólk.
- Hin toymisleiðarin fær ábyrgd av virðisbrævavgreiðslu og uttanlands-flytingum. Á hesum øki starvast í dag 7 fólk.

**Eldhugað starvsfólk til Kundatænastuna**
Kundatænastan í Eik er týðandi bindilið millum kundan og Eik. Umvegis telefonina avgreiðir Kundatænastan flytingar, svarar fyrispurningum frá kundum viðv. øllum gjaldskortum, Netbankanum og LimaGreiðsluni, umframt at stilla telefonir um til deildirnar og veita kundum okkara eina góða og skjóta tænastu.

Meira fæst at vita um størvini á heimasíðu okkara ella við at venda sær til Jeanette E. Blásvær, deildarleiðara á tlf. 348290, jeanette.blasvaer@eik.fo ella Erlu Johannesen, dagligan leiðara í Kundatænastuni á tlf. 348566, erla.johannesen@eik.fo. Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi **mikudagin 25. august**, og skulu stílast til:

Eik Banki P/F
Yviri við Strond 2
100 Tórshavn
Att.: Elin Sigvardsen, starvsfólkaleiðari
Ella í telduposti til elin.sigvardsen@eik.fo.

Í Eik samtakinum starvast á leið 400 fólk í Eik Banka í Føroyum, dótturfelagnum Inni P/F og í dótturfelagnum Eik Bank Danmark A/S. Á Starvsfólkadeildini Yviri við Strond í Havn starvast umframt leiðaran trý fólk.

**Les meira um størvini á** www.eik.fo



# Útbjóðing

## Nýggjur goymslubygningur í Klaksvík

Í samband við at nýggjur goymslubygningur skal byggjast á havnalagnum í Klaksvík, verður verkætlanin boðin út til almenna licitatión.

Arbeiðið verður boðið út í høvuðsarbeiðstøku. Høvuðsarbeiðstøkan fevnir um allar fakarbeiðstøkurnar í samband við byggingina. Fakarbeiðstøkurnar eru hesar: jørð- og lendisarbeiði, kloakarbeiði, betongarbeiði, stálarbeiði, timbur- og snikkaraarbeiði, málaraarbeiði, HVS-arbeiði og EL-arbeiði.

Talan er um ein goymslubygning 840 kvm við 9 metra fríhædd upp undir sperrurnar, samlaða bygningshæddin er uml. 11 metrar. Bygningurin er eitt rúm.

Bygningurin skal verða liðugur **1. mars 2011.**

Útbjóðingartilfarið verður sent út 11. august 2010 til teirra, ið hava rinda kr. 10.000,- í depositum á konto nr. 9181-215.720.0 hjá Selmar Nielsen Arkitekti Spf, Landavegur 9, Tórshavn. Peningurin verður afturgoldin um útleveraða tilfari verður innafturlatið seinast 31. august 2010.

Lisitatiónin verður **týsdagin 31. august 2010 kl. 11.00** á skrivstovuni hjá Looknorth P/F, Faktorsvegur 23, Klaksvík.

Looknorth tilskilar sær rætt frítt at velja millum innkomnu tilboðini, ella ongum at taka av.

P/F LOOKNORTH

P/F Looknorth Faktorsvegur 23 FO-700 Klaksvík Føroyar
Tel. +298 458100 Fax +298 458101 looknorth@looknorth.fo www.looknorth.fo

# Til sølu fyri 30.000,-



**Toyota Corolla 1,3 bensin**
**frá november 1999**
**Koyrt: 200.000 km**
**Sproytaðu í 2007**

**Ring 221070**